Umhvørvismálaráðið
umhvorvi@umhvorvi.fo
Gongin 7
Postrúm 377
FO-110 Tórshavn

Tórshavn 20-10-2025

Hoyringarsvar viðv. uppskoti til løgtingslóg um veðurlagslóg

Umboðandi brúkarafelagið *Skynsamur Fjarhiti* við fleiri enn 1200 húskjum í Tórshavnar kommunu og fleiri túsund borgarum, sum brúka fjarhita, takka vit fyri, at Umhvørvismálaráðið hevur sent uppskotið til løgtingslóg um veðurlagslóg til hoyringar.

Vit bjóða eini veðurlagslóg vælkomnari og taka undir við endamálinum við lógini í síni heild at skapa eitt burðardygt samfelag, sum hevur netto null útlát av veðurlagsgassi í 2050.

Vit hava hava viðmerkingar til lógina, sum vit halda eiga at verða tiknar við í teimum framhaldandi fyrireikingunum.

Fjarhitanetið, sum Tórshavnar Kommuna og SEV eiga, fór at virka síðst í áttati-árunum, tá ið eitt net av rørum varð lagt frá Brennistøðini á Sandvíkarhjalla til randarhúsini í nýggja býlinginum Millum Gilja. Í dag verður fjarhitanetið rikið av Fjarhitafelagnum, og netið er útbygt til stovnar, feløg og væl yvir 1200 privat húsarhald við fleiri túsund borgarum í Hoyvík, í Havnini og á Argjum.

Hugskotið aftanfyri fjarhitan í Tórshavnar kommunu var at veita umhvørvisvinaliga orku til borgarar í Tórshavnar kommunu í tann mun, at minni spillorka skuldi fara til spillis frá Brennistøðini á Hjalla og tungoljudrivna elorkuverkinum hjá SEV á Sundi. Síðan 2020 hevur fjarhitanetið fingið grøna orku frá biogassvirkinum Förka á Sandvíkarhjalla.

Stór ónøgd hevur verið millum fjarhitabrúkarar um príspolitikin hjá Fjarhitafelagnum, sum varð ásettur av báðum eigarunum, Tórshavnar Kommunu og SEV. Hóast fjarhitin var grundaður á spillorku, var prísurin fyri fjarhita umroknaður út frá tí dagliga prísinum á olju á altjóða marknaðinum. Avleiðingin var, at húskir javnan fingu eftirrokningar, tí altjóða oljuprísurin hækkaði. Samstundis vístu samanberingar, at fjarhitin kostaði umleið 17 % meira enn hjá húsarhaldum, sum høvdu oljufýring.

Tann høgi kostnaðurin fyri fjarhita, sum ikki var grundaður á veruligan framleiðslukostnað, førdi við sær, at Fjarhitafelagið sum alment partafelag í mong ár savnaði nógvan eginpening. Heldur enn at lata peningin koma brúkarunum til góðar, valdu Tórshavnar kommuna og SEV at varðveita tann høga brúkarakostnaðin og gera stórar og dýrar íløgur uppá fleiri 100 milliónir krónur í víðkan av fjarhitanetinum í kommununi. Hesar útbyggingar eru framvegis í gongd, og prísurin fyri fjarhita er framvegis hægri enn fyri oljufýring og nógv hægri enn fyri samanberiligar grønar orkuloysnir.

Okkara royndir sum fjarhitabrúkarar í Tórshavnar kommunu kundu verið góðar, tí fjarhitaveitingin hevur hjá flestu húskjum riggað væl. Okkara royndir eru tó, at samskifti, kunning og innlit í orkustøðuna hava verið trupul at fáa, og ónøgd okkara við prísstøðið og príspolitikin hava møtt afturlætnum hurðum og deyvum oyrum í mong ár. Okkara royndir vísa so statt, at kostnaður av grønari orku er partur av heildarmyndini, og brúkarar mugu verjast við regulering, eisini tá ið orkuveitarin er eitt alment felag.

Veðurlagslógin leggur upp til, at samfelagið røkkur netto nullútláti av veðurlagsgassi í 2050. Um eitt slíkt mál skal røkkast, skulu nógvar samfelagsbroytingar fremjast og um hesar ikki verða framdar við skili kann tað fáa kostnaðarmiklar og neiligar avleiðingar fyri okkara børn og børn teirra.

Vit mæla til, at veðurlagslógin í endamálsorðingini ikki einans nevnir netto null útlát av veðurlagsgassi í 2050, men eisini hevur sum endamál at varpa ljós á avbjóðingina av kostnaði av umlegging og broytingum, so vit ikki hótta livistøðið hjá okkara eftirkomarum.

Við heilsan

Brúkarafelagið Skynsamur Fjarhiti

skynsamurfjarhiti@gmail.com